# ONGANTÍÐ AFTUR

# FÓLKADRÁP

Mett verður, at meira enn 100 milliónir fólk hava latið lív í fólkadrápum tey seinastu 100 árini

**HER ERU NØKUR DØMI:**




NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL

STALINDRÁPINI

1928–1953

# SOVJET



## 11–14 MILLIÓNIR

## POLITISK MÓTSTØÐUFÓLK LÓTU LÍV

**Josef Stalin, sum var einaræðisharri í Sovjetsamveldinum árini 1928–1953, stóð á odda fyri tí kommunistiska stýrinum, sum kostaði milliónum av fólkum lívið.**

Nógv teirra, sum lótu lív, vóru politiskir andstøðingar ella fólk úr ávísum sosialum ella etniskum bólkum. Onnur vórðu meira tilvildarliga rakt av útreinsingum og yvirgangi.

Tað var ikki, fyrr enn eftir at Sovjetsamveldið var syndrað í 1991, at ein minnismentan tók seg upp um tey, sum lótu lív í fólkadrápinum undir stalinismuni.

NÁM AMNESTY INTERNATIONAL



ARMENSKA FÓLKADRÁPIÐ

1915 – 1922

# ARMENIA

## 1,5 MILLIÓNIR

## ARMENARAR LÓTU LÍV

**Fyri hundrað árum síðan vóru armenar fyri fólkadrápi í Osmannararíkinum. Við skipaðari fyribeining og burturrakstri vórðu millum eina og hálva aðru millión armenar fyribeindir árini 1915–1918.**

Tey, sum høvdu ábyrgdina í osmanniska stýrinum, sluppu undan rættarsókn. Í dag stríðast armenar um allan heim fyri, at fólkamorðið skal verða viðurkent og minnið um brotsverkini tryggjað.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL



TÝSKLAND

1938 – 1945

# HOLO-CAUST

## 6 MILLIÓNIR

## JØDAR LÓTU LÍV

**Fólkadrápið hjá nazistunum á jødar í Evropa verður nevnt Holocaust. Árini 1941–1945 vórðu seks milliónir jødar fyribeindir.**

Frammanundan høvdu jødarnir verið fyri mismuni og verið jagstraðir í tí nasistiska Týsklandi og í londunum, sum Týskland hevði hersett. Av øðrum minnilutum, sum nazistarnir jagstraðu, kunnu nevnast Jehova Vitni, samkynd, romafólk og fólk, sum bóru brek.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL




## REYÐU KHMERDRÁPINI

## 1975 – 1979

# KAMBODJA

## 1,7 MILLIÓNIR

## KAMBODJARAR LÓTU LÍV

**Tann kommunistiska kollveltingin hjá Reyðu Khmerunum í Kambodja kravdi árini 1975 – 1979 uml. 1,7 milliónir mannalív.**

Tey flestu doyðu í hungri og av sjúku, men stýrið avrættaði eisini nógv. Tvingsilsarbeiði, tvingsilsflutningur, píning og eftirlit vóru nøkur av amboðunum, sum stýrið brúkti at kúga fólkið við. Ikki fyrr enn fleiri áratíggjur seinni byrjaði ein rættaruppgerð. Tá var tann illa gitni leiðarin hjá Reyðu khmerunum, Pol Pot, longu deyður.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL



# KURDADRÁPIÐ HJÁ SADDAM HUSSEIN 1988

# IRAK

## 180 TÚSUND KURDAR LÓTU LÍV

**Í 1988 skipaði irakiska einræðisstýrið hjá Saddam Hussein fyri skipaðum fólkadrápi á irakisku kurdarnar.**

Við týningarpolitikkinum hjá Saddam Hussein vórðu meira enn 80 túsund kurdar fyribeindir, og útivið ein millión fólk vórðu rikin frá húsi og heimi. Endamálið við fólkadrápinum var at avfólka kurdisku økini í Irak.

NÁM AMNESTY INTERNATIONAL

RUANDADRÁPINI

1994



# RUANDA

## 800 TÚSUND

## TUTSIARAR LÓTU LÍV

**Eftir trimum mánaðum í 1994 beindu víðgongdir hutuar og teirra stuðlar fyri umleið 800 túsund tutsium og hóvligum hutuum. Við hatskari talu og propaganda varð fyrst roynt at loypa split í millum hutuar og tutsiar, og síðan varð eggjað til morð.**

Eftir fólkadrápið lá landið í skeljasori, og tvær milliónir fólk vóru rikin á flótta. Fólk í túsundatali vóru løstað og traumatiserað. Ruanda skal byggjast upp frá grundini.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL



BOSNIADRÁPINI

1992 – 1995

# BOSNIA

## 100 TÚSUND LÓTU LÍV

Kríggið í Bosnia var eitt blóðugt stríð millum fólkabólkarnar í landinum: serbar, kroatar og muslimar.

Meira enn ein millión fólk lótu lív í krígnum, sum vardi í hálvt fjórða ár og var merkt av blóðbaði, neyðtøkum, burturrakstri, fangalegum og píning. Í býnum Srebrenica vórðu útivið 8.000 bosniskir-muslimskir menn og dreingir fyribeindir í einum hópdrápi, sum ein ST-dómstólur seinni hevur dømt at vera fólkamorð.

NÁM AMNESTY INTERNATIONAL

DARFURDRÁPINI

2003 – 2020




# DARFUR

## 300 TÚSUND LATIÐ LÍV

**Í 2003 kyknaði stríðið í Darfur, sum er vorðið lýst sum alt frá tí verstu humaniteru vanlukkuni í heiminum til fólkamorð.**

Millum 300 og 400 túsund fólk hava latið lív, og meira enn tvær milliónir fólk eru rikin frá húsi og heimi. Í altjóðasamfelagnum hevur ósemja valdað, hvussu stríðið skal handfarast. Hvørki friðaravtalur ella ST-herlið í økinum hava megnað at steðgað stríðnum og valdsgerðunum móti tí vanliga fólkinum.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL

KRÍGGIÐ Í SÝRIA

2011 – 2020

# SÝRIA



**500 TÚSUND LATIÐ LÍV OG MEIRA ENN 13 MILLIÓNIR FLÓTTAFÓLK**

**Kríggið í Sýria byrjaði við einum friðarligum uppreistri á vári í 2011. Stjórnin slóg hart niður á uppreistrarfólkið, og eftir stuttari tíð var rættiligt borgarakríggj.**

Eftir 9 ára langt kríggj eru fleiri enn 500.000 fólk deyð, og fleiri enn 6 milliónir fólk eru flýdd úr landinum, meðan 6 milliónir eru innanhýsis flýdd í Sýria. Hetta er helmingurin av fólkinum í landinum.

Tað, sum byrjaði sum ein uppreistur, er nú eitt stríð, har bæði sekulerar og islamistiskar kreftir og uppreistrarbólkar luttaka í einum blóðugum stríði, har bæði valdshavarar á staðnum, men eisini altjóða valdshavarar sum USA, Russland, Turkaland, Iran og Saudi-Arabia stríðast um vald.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL



MYANMAR

2017–2020

# MYANMAR

**10 TÚSUND**

**ROHINGYA-MUSLIMAR**

**LATIÐ LÍV**

**OG MEIRA ENN**

**730 TÚSUND**

**FLÓTTAFÓLK**

**Rohingya-muslimar í Rakhinepartinum av Myanmar hava fleiri ferðir verið tvungin at flýggja frá harðskapi og kúgan seinastu áratíggjuni.**

Í september í 2018 staðfesti ein ST-frágreiðing hjá Mannarættindaráðnum, at herðurin í Myanmar síðani 2011 hevur staðið fyri skipaðum mannarættindabrotum og álvarsomum brotum á altjóða rætt. Eftir hendingarnar, sum byrjaðu í 2017, har herðurin aftur tók upp forfylgingina av rohingyafólkinum, eru umboð fyri Myanmar sett fyri altjóða krígsbrotsmannadómstólin, har tey eru skuldsett fyri at standa fyri fólkadrápi og krígsbrotsverkum.

NÁM

AMNESTY INTERNATIONAL